# Sær rættiliga myrkt út

**Fær vinnan øktar útreiðslur, versnar kappingarførið tilsvarandi, sigur formaðurin í Føroya Arbeiðsgevarafelag**

SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Vit kunnu ikki annað enn staðfesta, at arbeiðarafeløgini hava sagt sáttmálan upp.

- Og so taka vit tað haðani frá, leggur hann afturat.

Johan Páll Joensen, formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag, hevur nakrar serligar viðmerkingar til tann veruleika, at arbeiðarafeløgini nú hava sagt sáttmálarnar upp

Hann sigur, at nú bíða tey eftir til samráðingarnar vera og so taka tey tað, sum tað kemur.

Sostatt hevur hann heldur onga viðmerking til eitt møguligt krav um lønarhækkingar.

Kortini staðfestir hann, at vinnan kemur at hava tað ivaleysa tungt hesa næstu tíðina og so frægt hann dugir at síggja, er ongin bati at hóma úti í havsbrúnni.

- Í løtuni sær rættiliga myrkt út. Tað gongur sjón fyri tí hvønn einasta dag, leggur hann afturat.

Og hann staðfestir eisini, at veruleikin er rættiliga einfaldur. Og veruleikin er, at ein og hvør broyting fer sjálvandi at ávirka vinnuna tann vegin, sum broyting er.

Tað, hann leggur í hetta, er, at økjast byrðarnar hjá vinnuni, verður kappingarførið tað verri. Og lætna byrðarnar, verður kappingarførið sostatt eisini tað frægari.

Tað einasta, hann vónar, er at samráðingarnar verða góðar og at útgangsstøðið verður tikið í tí veruleika, vit liva í.

Men hann fegnast kortini um, at arbeiðarafeløgini ætla at samráðast í felag, tí tað gera samráðingarnar lættari.

# Hægri tímaløn kann føra til minni arbeiði

**Enda samráðingarnar, sum nú skulu verða ímillum arbeiðsgevarafelagið og arbeiðarafeløgini við lønarhækking, kann tað føra til, at færri fólk verða í starvi, sigur stjórin í Vinnuhúsinum**

SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Arbeiðsgevarar staðfesta, at sum støðan í vinnuni er í løtuni verður tað øgiliga tórført, fyri ikki at siga heilt ómøguligt, at ganga ynskinum um lønarhækking á møti*

Skulu føroyskar vinnufyritøkur nú betala hægri løn til arbeiðsfólk, kann tað føra til at arbeiði verður til færri fólk.

Tað staðfestir Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum í tíðindunum á Rás2.

Hon hevur ikki so nógvar viðmerkingar til, tíðindini, vit bóru nú ein dagin um, at arbeiðarafeløgini hava gjørt av at siga sáttmálarnar upp, so at teir fara úr gildi á miðnátt 30. apríl.

Arbeiðarafeløgini hava víst á, at keypiorkan er minkað og tað er lítið at ivast í, at krøv fara at koma um lønarhækkingar.

### Ikki óvart á

Tað kemur ikki heilt óvart á stjóran í vinnuhúsinum, at arbeiðarafeløgini fara at krevja hægri løn.

Kortini hevur hon ikki hug til at gera tær stóru viðmerkingarnar til samráðingarnar, longu nú, áðrenn tær eru byrjaðar.

Men við Rás2 við staðfesti hon kortini, at sum støðan er í dag, verður tað sera tórført at ganga tí ynskinum á møti – fyri ikki at siga heilt ómøguligt.

- Vinnufyritøkurnar líða undir, at eftirspurningurin eftir vørum og tænastum er fallin munandi og tað verður av álvara stríðst fyri at fáa endarnar at røkka saman, segði hon við.

Tíðindakvinnan á Rás2 vísti Maritu Rasmussen á, at í øðrum londum er tað komið fyri, at fakfeløg hava góðtikið at fara niður í løn fyri at varðveita arbeiðspláss og hon spurdi um vit eisini kunnu koma í eina støðu í Føroyum, har arbeiðsgevararnir fara at krevja, at lønin lækkar.

Heldur ikki tað vil stjórin í vinnuhúsinum gera viðmerkingar til.

Men hon staðfestir einaferð enn, at tað er ongin ivi um, at vinnufyritøkur hava tað tórført, tí eftirspurningurin eftir vørum og tænastum, bæði á føroyska og serliga útlendska marknaðinum er fallin og samstundis eru prísirnir falnir.

- Tað er ringt hjá fyritøkunum at fáa samanhang í raksturin, sigur hon.

Og hon leggur afturat, at hægri lønir kann føra til uppsagnir og økt arbeiðsloysi

- Hægri lønir kann føra til færri fólk í starvi og tað eru hesi bæði, sum skulu vigast upp ímóti hvørjum øðrum segði hon við Rás2.

### Lønin hækkað munandi

Hon ásannar, at prísirnir eru hækkaðar, men hon vísir samstundis á, at seinastu trý árini er lønin hækka 9%-10%, so talan hevur verið um munandi lønarhækkingar

- Nú er støðan eitt heilt onnur og útgangsstøðið eitt heilt annað, staðfestir hon.

Hon sigur, at arbeiðsgevararnir fara nú at umhugsa, hvørji mál, teir fara at reisa í samráðingunum og at fyrireika seg til samráðingarnar annars. Og tá ið samráðingarnar byrja, verða krøvini so løgd fyri partarnar.

# Rúsevnini skuldu til Íslands

**Rúsevnini, sum funnin vórðu í bilinum hjá teimum varðhaldsfongslað litavunum í Føroyum, vóru so væl krógvað, at tollararnir noyddust at pilka bilin sundur fyri at finna tey**

RÚSEVNI
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Kriminalpolitiið hevur nú í tveir mánaðir kannað størsta rúsevnismál í Føroyum nakrantíð. Hetta verður gjørt í tøttum samstarvi við tollvaldið í Føroyum og í Íslandi, við politiið í Litava og við Evropol.

Málið byrjaði við, at tveir litavar í 20-árunum mánamorgunin 9. november komu til Føroya við Norrønu.

Tollararnir høvdu tosað við starvsfelagar í Íslandi, sum góvu eina ábending um, at hesir menninir kundu vera smuglarar.

Bilurin varð tí tikin til viks at kanna, og arbeiðið var so drúgt, at menninir, sum skuldu víðari til Íslands, vóru afturútsigldir av Norrønu. Henda túrin hevur Norröna eisini framskundað fráferðina til Íslands.

### Væl fjalt

Tollararnir funnu einki í bilinum, men teir sleptu kortini ikki illgrunanum. Tríggjar dagar seinni vendu teir sær til kriminalpolitiið, sum fór eftir monnunum, og tollarar og politistar fóru undir at kanna bilin nærri. Teir pilkaðu hann sundur, og tá funnu teir trý kilo av metaamfetamini og umleið 4.200 ecstasy-tablettir. Rúsevnini vóru so væl krógvað í bilinum, at hundarnir ikki kundu snoddað seg fram til tey. Hvar tey vóru fundirnir hava verið krógvað, vil Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini ikki siga, tí rættarfundirnir hava verið fyri afturlatnum hurðum.

Teir báðir litavarnir vórðu varðhaldsfongslaðir 14. november, varðhaldsfongslingin er síðan longg, og seinasta varðhaldsfongslingin gongur út 15. januar.

Kriminalpolitiið hevur higartil dult hetta málið sum mansmorð, men tá ið tíðindini komu út í Íslandi fyrr í vikuni, fæst eitt sindur at vita frá politinum í Føroyum.

Politiið í Íslandi hevur illgruna til tríggjar litavar, sum búgva í Íslandi, tveir menn og ein kvinna, at hesi fólk skuldu hava rúsevnini, ið strandaðu í Føroyum, og tey trý eru varðhaldsfongslað.

Kriminalpolitiið heldur fyri vist, at rúsevnini ikki vórðu ætlað til føroyska marknaðin.

### Stór nøgd

Hetta er størsta rúsevnismál í Føroyum nakrantíð. Hesaferð var nøgdin sum nevnt trý kilo av metaamfetamini, sum er nógv sterkari og tí dyrari enn vanligt amfetamin, og so 4.200 ecstasytablettir. Virðið á evnunum er fleiri milliónir krónur.

Til sammetingar kann nevnast, at í sonevnda Polarstjørnumálinum var nøgdin eitt kilo av amfetamini og eitt kilo av ecstasy-pulvuri.



*Virðið á teimum 4.200 ecstasy-tablettunum er umleið 1,3 mió. krónur. Metaamfetaminið er mangt slíkt vert*
*(Savnsmynd)*